## Ein hvirla kom framvið ...

Fyri einari lítlari løtu síðan kom ein hvirla bóltandi framvið glugganum her í erva í Miðlahúsinum. Í føvninginum bar hon summarið; Og eg takki fyri smáu og dýrabaru løturnar, sum ríka lívið: góðveður-sdagarnar í haganum, angan av nýslignum grasi, á uttan-dura café ljósu næturnar í góðum vertskapi og børnini, sum spæla úti til á midnátt. Ja, føroyska summarið er nakað heilt serligt. Kanska áttu vit at lagt okkum eftir at hátíðarhildið summarið heima, og heldur farið uttanlands vetrarhálvuna, tá brimið dálkar rútarnar og myrkrið fjalir støv og skitt á skápshurðunum?

Fært tú útilongsul, kanst tú droyma teg burtur saman við okkum í Rákinum hesaferð. Tí vit hava bæði verið í Tailandi og í Reykjavík – tvey vælegnað ferðamál í vetrarhálvuni.

Í Tailandi fært tú hita, spennandi upplivingar og eksotiskan mat, meðan Reykjavík er perfekta staðið til ein herligan vinkonutúr. Ikki minst nú íslendska krónan er so lág, at íborna kvinnuliga shopping-genið fær tørv sín nøktaðan.

**Rákið**
Sosialurin
Postboks 76
Fo-110 Tórshavn

REDAKTØRUR
Rigmor Dam
Rigmor@sosialurin.fo

BLAÐFÓLK
Inna Törnroos
Anna V. Ellingsgaard
Dorit Hansen
Rigmor Dam
Bjørk Olsen
Annika H. Isfeldt

LÝSINGAR
Gudny Langaard
gudny@sosialurin.fo

MYNDIR
Álvur Haraldsen
Sunva Eysturoy Lassen

Permumynd:
Asta-clothes
www.astaclothes.is

*Lagt til rættis: Rigmor Dam, Inna Tørnroos & Sunva Eysturoy Lassen*



# Rein og vøkur við miniralum

Smyrsl úr natúrligum miniralum er gott nýtt fyri hana, sum elskar at smyrja sær, men sum eisini ynskir sær eitt natúrligt og heilsugott alternativ til kemisku vørurnar.
Nature's Minerals™ frá The Body Shop© hevur natúrlig miniral, varliga útvald, so tey lúka krøvini til vakra, heilsugóða og natúrliga útsjónd.

Smyrslið hóskar væl til viðbrekna húð og inniheldur hvørki olju, parfumu ella eftirgjørd útílatingarevni.

Í hesum døgum kemur nýggja smyrslið Nature's Minerals™ frá The Body Shop©. Í røðini eru seks ymiskir litir av løttum puturfoundation við sólfaktor 25, fýra lekrir litir av kinnareyðum, seks vakrir putureygnaskuggar við perlumóðir, og serligar bustir til smyrslið.
Miniralskt smyrsl:
- er sera drúgt
- hóskar væl til fólk, sum hava ovurviðkvæmi
- er uttan parfumu, alkahol ella útílatingarevni
- heldur sær væl, til dømis í regni og tá tú sveittar
- ger so húðin hvørki kennist vát ella feittut



## Humoristiskt handarbeiði til rebelskar húsmøður

At brodera er tað heilt stóra hjá ungum kvinnum í grannalondunum. Men myndirnar skulu lagast til nútíðina, og framyvir verður tað soleiðis ikki eitt ommusligt "Gud signi heimið" ella "Home sweet home", sum hongur omanfyri hurðini í forstovuni. Nei, í dag skriva tey "Homo sweet Homo" ella "I used to be indecisive (óavgjørd), now I'm not sure" . Mynstur og tilfar fæst á www.fuldesign.se, har tey eisini hava eina rúgvu av øðrum mynstrum, klár at taka niður av netinum.

Maria Johansson er eisini í tí humoristiska horninum, tá ið hon heklar grýtulappar, har tað stendur til dømis "Fuck the diet" ella "Øh ... bestill pizza". Keyp teir á www.cosas.se.







## Hár, ið hjálpir

Locks of Love er ein vælgerandi felagskapur, sum hevur til endamáls at geva sjúkum børnum í USA og Kanada ókeypis hár. Lokkarnir, sum tú sendir, Locks of Love, verða latnir børnum, sum koma úr familjum, sum ikki sjálvar hava ráð at keypa parykkar og hár. Børn, sum hava mist hárið, verða ofta happað og halda seg burtur frá øðrum børnum. Við nýggja hárinum kunnu tey kenna seg sum onnur børn aftur. Á heimasíðuni www. locksoflove.org stendur alt um, hvussu tú kanst vera við til at hjálpa børnum, bara við at lata eitt petti av tínum hári. Locks of Love er óheft av øllum politiskum, átrúnaðarligum og fíggjarligum bondum.





*Royal á Landavegnum klipti halan.*

## Kreativa tú..

Keyp ein langan bana av ljósareyðum tyll og drag eitt elastikk ígjøgnum sum líning. Prinsessurnar jubla!

